## Pólurin kanska ísfríur

Nýggjar mátingar hjá amerikanska stovninum National Snow and Ice Data Center vísa, at ísurin í tí arktiska økinum bráðnar nógv skjótari í summar enn í fjør. Sambært mátingunum er talan um heilar 8.000 ferkilometrar meiri - um dagin, og granskararnir vænta, at heldur hetta fram, verður Norðpólurin ísfríur longu í summar. National Snow and Ice Data Center sigur, at í dag er ísurin í póløkinum helvtina av tí, sum hann var fyri 50 árum síðani.



*Í summar verður kanska eingin ísur á Norðpólinum*

*(Mynd: KNR)*

## Steven Curtis Chapman kemur ikki

Hann skuldi verða stóra navnið á Fjarðafestivalinum í ár. Men nú hevur hann avlýst Føroyaferðina. - Vit eru keddir av at skula kunngera hetta, sigur Eyðun Jacobsen, ein av fyriskiparunum av festivalinum. Familjan Chapman var fyri fáum vikum síðani úti fyri eini syndarligari bilvanlukku, har yngsta dóttur teirra, Maria lat lív. Hon var bert 5 ára gomul. - Vit skilja sjálvandi at Steven hevur tikið hesa avgerð, og vit syrgja saman við honum og familjuni, sigur hann. Leiðslan í Fjarðafestivalinum arbeiðir í løtuni við at finna ein avloysara. Ein loysn verður helst klár í komandi viku.

# Runavíkar kommuna fær tveir nýggjar barnagarðar

**Lendið er tøkt, útgrivið og planerað til tveir nýggjar barnagarðar í Runavíkar kommunu. Annar verður bygdur á Skála, hin í Søldarfirði**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í næstum verða tveir nýggir barnagarðar bygdir í Runavíkar kommunu. Hetta gjørdist greitt, tá sáttmáli seinnapartin mikudagin varð undirskrivaður millum Runavíkar kommunu og P/F Búsetur, sum kemur at standa fyri projektering og verkætlanini annars. Tað er Palli Gregoriussen, arkitektur, sum hevur teknað.



*Tað er Palli Gregoriussen, arkitektur, sum hevur teknað, meðan P/F Búsetur projekterar og stendur fyri verkætlanini. Nakrar tillagingar eru gjørdar í mun til hesa upprunatekning*



*Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri og Hallur Hansen, verkætlanarleiðari hjá P/F Búsetur, skriva undir sáttmála um bygging av tveimum barnagørðum*

*Mynd: Oluf í Toft*

Sáttmálin varð undirskrivaður av borgarstjóranum í Runavíkar kommunu, Hans Jacob Lamhauge, øðrumegin og Halli Hansen, verkætlanarleiðara hjá P/F Búsetur, hinumegin.

Barnagarðarnir, sum nú skulu byggjast á Skála og í Søldarfirði, eru eins, og teir verða bygdir eftir nøkulunda somu tekningum, sum barnagarðarnir á Argjum og á Velbastað.

### 26-28 miljónir

Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri, sigur, at nú sáttmáli er undirskrivaður, fer Búsetur beinanvegin í gongd við sínar fyrireikingar til sjálva byggingina.

- Lendið er tøkt, útgrivið og planerað bæði á Skála og í Søldarfirði, og sambært ætlanini verða barnagarðarnir tiknir í nýtslu á heysti 2009.

Borgarstjórin sigur, at í fyrstu syfti verða báðir gjørdir lidnir uttan, og síðan verður helmingurin innrættaður.

### Fíggjarkarmurin

- Vit hava í fyrsti syftu ein fíggjarkarm upp á 19-20 miljónir krónur, sum er kostnaðurin av at byggja báðar barnagarðarnar og innrætta helmingin.

Hans Jacob Lamhauge vísir á, at tá komið er har til, at báðir barnagarðarnir standa uppi, og helmingurin er innrættaður, verður støða tikin til, nær restin skal gerast.

- Tær 26-28 miljónir krónurnar er kostnaðurin av samlaðu verkætlanini, tá alt er liðugt, leggur borgarstjórin aftrat.

Í Runavíkar kommunu er eisini kommunal dagrøkt, og hendan verður í brúki, so leingi stovnar ikki eru tøkir, sum nøkta allan ansingartørvin.

## Deydligt við bryggjukantin í Klaksvík

**Landararnir í Klaksvík hava ikki havt nógv at gjørt hesa vikuna, nú tómligt hevur verið við Kósabrunna, men í dag og mánadagin koma skip innaftur at landa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hesa vikuna hava fýra skip landað í Klaksvík.

Mánadagin vóru partrolararnir Safir og Smaragd inni. Teir høvdu sløk 150.000 pund tilsamans, meginparturin upsi.

Mánadagin landaði Helena 85.000 pund av línufiski.

Týsdagin og mikudagin var eingin landing í Klaksvík, men í morgun landaði trolbáturin Olevina, sum hevði 5.000 pund av landleiðini.

Ågot, sum roynir við gørnum, landar í Klaksvík í dag. Teir hava stívliga 25.000 pund av svartkalva.

Mánadagin koma partrolararnir Fjalshamar og Nónhamar, men í gjár visti Landingarmiðstøðin í Klaksvík ikki, hvussu nógv skipini hava inni.

Sum skilst, er fiskiskapurin hjá ísfiskatrolarunum smáligur í løtuni.



*Mánadagin verður aftur landing í Klaksvík, tá partrolararnir Fjalshamar og Nónhamar koma inn at landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*